gult cyan magenta svart

Knopfler, Hamsun og Pynchon

A world away from the coaly Tyne, sailing to Philadelphia, to draw the line, the Mason-Dixon Line

Birgir Kruse

Tá Mark Knopfler ger tónleik lesur hann altí› í bókum. Og er oftast á fer›. Tá hann yrkti "Telegraph Road" í 1982 læs hann í The Growth of the Soil hjá Knut Hamsun, i› er enska heiti á skaldsøguni, hvørs norska upprunaheiti er Markens Grøde. Í 1972 gav Bókagar›ur søguna út í t‡›ing He›in Brú's vi› heitinum Vælfer›in. Vi› hesi bók í føvninginum lendi Mark Knopfler í amerikanska ídna›arb‡num Detroit. Hann koyrdi gjøgnum b‡in, hugdi upp úr bókini og sá› einusinni skelti "Telegraph Road". Vegurin tyktist ongan enda hava og honum kom til hugs hvussu vegurin mundi ver›a vor›in til. Hann klamsa›i bókina saman og har var sangurin. Frítt hangandi í luftini. Í 14 minuttir á plátu. Sama hendir 18 ár seinni. Í amerikanska b‡num Philadelphia millumlendir bretski gittarsnillingurin og hevur eina bók hjá amerikanska rithøvundanum Thomas Pynchon vi› sær. Pynchon er føddur í 1937 og hevur skriva› fantastiskt merktar, ofta dapurskygdar skaldsøgur, gjøgnumsúrga›ar av ertandi svørtum skemti. Hann hevur fingi› Faulkner-vir›islønina fyri bókina "V" í 1963 og National Book Award fyri "Gravity's Ranbow" í 1973. Henda bók ver›ur mett sum høvu›sverk hansara. Skaldsøga Pynchon's, sum Knopfler lesur í "Mason & Dixon" kom í 1997. Bókin er um amerikanska trælamarki› The Mason-Dixon Line. Knopfler lesur og fer›ast. Burturúr kemur "Sailing to Philadelphia", har hann syngur saman vi› James Taylor. Í sanginum spæla bá›ir hvør sín leiklut. Taylor er Mason og Knopfler er Dixon. Bá›ir eru teir bretar ávegis til n‡ggja heimin. Teir sigla úr "coaly Tyne to draw the line, the Mason-Dixon line" sum sagt ver›ur í sanginum "Sailing to Philadelphia". So tónleikur Knopflers tykist spretta úr tí at fara um mark. At flyta seg millum heimspartar, fólkasløg og mentanir. "Sailing to Philadelphia" er n‡ggjast fløga Mark Knopfler's har kend nøvn sum Van Morrison, James Taylor og Gillian Welch medvirka. F‡ra ár eru li›in sí›ani Knopfler sí›st gav fløgu út í egnum navni. Ta› var "Golden heart". Hetta f‡ra ára skei›i› hevur gittarsnillingurin, sum er føddur í Glasgow, men vaks upp í Newcastle, tó gjørt tónleik til tríggjar filmar: Wag the Dog, Metroland og A Shot at Glory. Mark Knopfler, sum er 51 ára gamal, er útbúgvin lærari. Sigst, hann hevur vitja› í Føroyum. Vit frætta fegin, um nakar sá hann fara um mark.

Vikuskifti
Postboks 19, 110 Tórsahvn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Bla›stjórn: Eirikur Lindenskov

Bókastevna í Forum

Durita Holm ver›ur á básinum hjá Borgen í Forum

Birgir Kruse

Fríggjadagin letur upp árliga bókastevnan "BogForum 2000" í Forum í Keypmannahavn. Hetta er 9. fer›in at stevnan ver›ur hildin. Gestirnir eru ikki bara danir, men eisini úr Føroyum og umheiminum annars. Ein av forvitnisligu gestunum úr Føroyum, er sjónvarpsaktuella Durita Holm, sum siglt hevur vi› Sølku Vølku kring knøttin. Hon ver›ur at hitta á básinum hjá danska forlagnum Borgen. Á altjó›a bókastevnuni í Frankfurt var› bók hennara um fer›ina vi› ferrocement bátinum, sum á›ur hev›i heimsta› á Sandi, at síggja. Á stevnuni í Forum sæst og hoyrist alt, i› hevur vi› bøkur at gera. N‡ggjar útgávur, kjak og samrø›ur vi› rithøvundar, sum signera› og lesa upp. Og afturvi› fæst kaffi og bjór. Umframt at hitta aktuellu rithøvundarnar ber til at ver›a vi› í kjaki um mannarættindi, n‡feminismu og multietniska n‡danmark. Umframt Duritu Holm, ver›a Bret Easton Ellis, Anita Desai, Per Olov Enquist, Liza Marklund og Jan Guillou millum teir útlendsku rithøvundarnar, sum ivaleyst fara at gera vart vi› seg á bókastevnuni í Forum. Allir teir aktuellu donsku rithøvundarnir møta og ætlanin er eisini, at hansara hátign Heindrikur Prinsur vitjar í Forum og lesur úr egna yrkingasavninum "Cantabile". Nú Ingrid Drotning doy›i er óvíst hvussu hetta ver›ur. Atgongugjaldi› er 60 krónur og dyrnar lata upp fríggjadagin hin 17. november klokkan 10. Stevnan varir í tríggjar dagar. Eina knappa viku eftir stevnuna er ársins sí›sta stóra rockkonsert á sama sta›i. Tá fara D:A:D og Sort Sol at spæla so oman rapa allar bøkur.

Mín jólabók í 50 ár

Kvinnur skriva søgur í ársins jólabók, sum í ár hevur hálva øld á baki

Birgir Kruse

Jólini nærkast í hvørjum. Solei›is syngja vit. Og ikki er ta› sørt, at hetta lagi› longu er at hoyra frammanfyri mongum handilsglugga á bygd og í b‡. Príslistar, vøruskráir, jólakalendarar og glitrandi sernumrini av støru donsku vikubló›unum eru longu komin og allarhelst lisin.

Í Danmark hava illar nissur savna› seg í Nisser-nes Befrielsesfrenst at krevja, at einki jólapynt og einki, i› ber brá av jólum, skal síggjast, hoyrast ella takast framm fyrr enn fyrsta lúkan er latin upp - hin 1. desember. Tástani kann talast um eini røtt jól. Halda tey.

Men tá lepin um at tekna seg til jólabókina ver›ur borin heim, tá stundar av sonnum til jóla. Kring alt landi› hava lærarar trúliga b‡tt út se›lar, so "Mín jólabók" kann koma í hvørt hús, tá børnini fara heim í jólafrí.

Trúliga hevur hetta arbei›i ver›i› gjørt í hálva øld. Tí so gomul er jólabókin. Hin fyrsta kom í 1950. Og ivaleyst eigur onkur allar bøkurnar, komnar eru hetta drúgva skei›i.

Í hesum fimti ára skei›i er tó eitt ár gloppi› burturímillum. Ta› var ta› ári›, i› Lærarafelagi› gav út vælumtóktu "glæstribøkurnar". Tá kom eingin jólabók. Rá›ini vóru ikki til tess.

Í ár, nú 50 ár eru li›in sí›ani fyrsta jólabókin kom út, er ta› hin unga Tanya Ey›unsdóttir Joensen, i› hevur myndpr‡tt bókina. Tanya er ætta› sunnan úr Vági, er sjálvlærd tá um tekning ræ›ur og arbei›ir dagligt á Bacalao í Havn. Tanya hevur tekna› fyri Barna- og Ungdómsbla›i›, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags eisini gevur út, í tvey ár.

Sum vanligt er jólbókin fjølbroytt. Har eru søgur og yrkingar, bæ›i uppruna føroyskar og t‡ddar. Meginparturin er uppruna føroyskur og hyggja vit nærri, siggja vit, at kvinnuligir høvundar eru í meirluta fyri allar søgurnar. Tær skrivandi kvinnurnar eru m. a. Lydia Didriksen, Sólrun Michelsen, Birgit Arge, Maud Heinesen og Ella Smith Clementsen. Ein mann fái eg eyga á, solei›is vi› fyrsta eygnakast, ta› er sálmayrkjarin nor›an av Ei›i Kjartan Stakksund.

"Mín jólabók" fevnir um 130 sí›ur og kostar 70 krónur. Útgevari er Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Hann er totalt langt úti

PROVO - Eg byrja›i spakuliga at gera provokerandi tekningar, men nú eru tær totalt langt úti, sigur Jógvan á Høvdanum, sum júst hevur givi› út n‡ggja teknirø›

- Summi fólk er um at blíva svøk av mær og mínum tekningum, og vi› hvørt ver›i eg skelda›ur út og fái at vita, at eg má gevast vi› at gera slíkar tekningar, tí ta› er bæ›i synd og skomm, sigur Jógvan á Høvdanum, yngri

Ey›un Klakstein

Hann ger ivaleyst ørastu tekningarnar í landinum.

Tey, sum hava lisi› ungdómsbla›i› hjá Dimmlætting, kenna strikurnar aftur í táttinum Totalt langt úti.

Nú hevur ma›urin aftan fyri argandi tekningarnar gjørt n‡ggja teknirø vi› sama navni, sum fer nógv longur, enn nøkur føroysk útgáva á›ur er farin.

- Summi fólk er um at blíva svøk av mær og mínum tekningum, og vi› hvørt ver›i eg skelda›ur út og fái at vita, at eg má gevast vi› at gera slíkar tekningar, tí ta› er bæ›i synd og skomm, sigur Jógvan á Høvdanum, yngri.

21 ára gamli klaksvíkingurin hevur seinastu tvey árini tekna til Krydd, men nú roynir hann seg á fyrsta sinni vi› egnari útgávu.

Og at hann hevur tiki› hetta stigi› hevur eisini havt vi› sær, at hann nú fer nógv longui í sínum tekningum.

Ikki altí› so skemtiligt

Jógvan á Høvdanum hevur tekna› alt sítt lív, men ta› er ikki fyrr enn seinastu tvey árini, at hann er komin í fram og er vor›in meira kendur millum fólk.

- Eg byrja›i spakuliga at gera provokerandi tekningar, men nú eru tær totalt langt úti, heldur Jógvan.

- Fólk halda ivaleyst, at tekningarnar í Krydd hava veri› langt úti, men ta› er einki aftur ímóti tekningunum í n‡ggju teknirø›ini.

Og tey, sum hava bla›i› ígjøgnum teknirø›ini, kunnu ikki anna› enn taka undir vi› teknaranum.

- Fólk geva yrkingasøvn út, sum bæ›i kunnu ver›a pervers og deprimera, og tí haldi eg, at ta› er stuttligt at koma vi› eini teknirø, sum er tann reina ballada og kanska eisini eitt sindur stuttligt vi› hvørt, heldur Jógvan.

- Ofta eru mínar tekningar ikki so ræ›uliga skemtiligar, men fólk grína kanska eftir teimum, tí tær eru so langt úti.

Ikki øll grína

Men hóast Jógvan á Høvdanum vónar, at onkur tímir at grína eftir hansara tekningum, so eru ta› ikki øll, sum gera ta›.

- Ta› kemur meira enn so fyri, at fólk siga vi› meg, at mínar tekningar eru b‡ttisligar, men eg veit, at tey ikki meina ta›. Eg veit, at tey dyrka tær, sigur Jógvan argandi.

- Familjan hjá mær royndi í fyrstuni at fáa meg at gevast at tekna slíkar tekningar, men ta› gera tey ikki longur. Tey mugu gó›taka, at ein uppløgd fiasko gjørdist ein succes.

Í tekningunum hjá Jógvani eru evni sum rúsevni, kynslív og átrúna›ur afturvendandi evni, og einki ver›ur balla› inn.

Í foror›unum til n‡ggju teknirø›ina reksar hann nøkur av or›unum upp, sum koma fyri í tekningunum, og fólk fáa at vita, at um tey ikki klára at lesa slík or›, so kunnu tey reisa og renna, tí so er teknirø›in einki fyri tey.

- Sjálvandi eru ta› mest ungfólk, sum dáma tekningarnar hjá mær, men ta› eru eisini tilkomin fólk, sum halda tær eru stuttligar, sigur Jógvan.

Hugskot frá egnum upplivingum

Persónarnir í tekningunum hjá Jógvani eru vor›nir ey›kendir, og stílurin í tekningunum er ráur og avbjó›andi.

Jógvan fær millum anna› íblástur av teknirø›um sum Mad og Stupido, men eisini persónligar upplivingar kunnu ver›a orsøk til onkrar tekningar.

- Vi› hvørt kann ta› ver›a okkurt, sum eg komi út fyri, sum gevur mær hugskot til eina tekning. Men eg kann siga, at eg tekni alt ta›, sum fólk ikki tora at hugsa um, sigur Jógvan á Høvdanum.

N‡ggja teknirø›in hjá honum er 52 bla›sí›ur til longdar. Kápan er í litum, me›an innihaldi› er svart og hvítt.

Jógvan á Høvdanum hevur gjørt allar tekningarnar í rø›ini, og Svabo Creations hava lagt útgávuna til rættis.

Teknirø›in, sum kostar 50 krónur, fæst kring alt landi›.

I› hvussu so er har, tær ikki eru brendar.

Ein av tekningunum úr n‡ggju teknirø›ini hjá Jógvani á Høvdanum